**Býráðsfundur mánadagin 26. august 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00306**<br>**Umsókn um byggiloyvi til garagu/bilhús á matr. nr. 347ak í Leirvík**<br>Ólavur Poulsen, Leirvík hevur sent umsókn um loyvi at byggja garagu/bilhús. Saman við umsóknini er váttan frá grannanum um loyvi at byggja nærri enn 2,5 metrar.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Ólavur Ólason Poulsen fær byggiloyvi til bilhús sambært innsendu umsókn og tekningum. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Brandur Jacobsen<br>Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen,<br><br>**Atkvøður ímóti:**<br>Oluffa Joensen, við tí viðmerking at tað er skeivt ikki at fylgja tilmælinum hjá fagkunnleikanum. |
| 2. | **13/00338**<br>**Umsókn um frábýti av matrikul nr. 360 (Hebron) í Leirvík.**<br>Umsókn er móttikin frá salinum Hebron um sundurbýti av matr. nr. 360.<br><br>Byggi og byarskipanarnevndin mælir til at Hebron fær loyvi at fremja sundurbýti sambært galdandi byggisamtykt fyri Eysturkommunu øki B, grein 3. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini |
| 3. | **13/00284**<br>**2. viðgerð av eykajáttan til - Børn við serligum tørvi**<br>Á seinasta fundi bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 300.000,00. Peningurin verður tikin av konto 2.21.31.510 (Barnavernd).<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð. | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð |

**Býráðsfundur mánadagin 26. august 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | | |
|---|---|---|
| **4.** | **13/00000**<br>**1.viðgerð av eykajáttan til keyp av bili til brunaumsjánarmannin.**<br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 300.000,00.<br><br>Peningurin verður tikin av innistandandi. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| **5.** | **13/00136**<br>**2.Viðgerð av eykajáttan til Fríðkan av bygdini**<br>Á seinasta fundi bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 400.000,00. Peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð. | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð. |
| **6.** | **10/00302**<br>**2.Viðgerð av eykajáttan til konto 2.21.72.510 (Forsorg)**<br>Á seinasta fundi bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 350.000,00. Peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð. | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð |
| **7.** | **13/00317**<br>**Umsókn frá Kiwanis Eysturoy um skattafrælsi**<br>TAKS biður um álit frá kommununi í samband við viðgerðina frá Kiwanis Eysturoy um skattafrælsi.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at viðmæla at umsóknina verður gingin á møti. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 26. august 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**8. 13/00309**

**Keyp/Yvirtøka av vegi undir Gøtueiði, vegurin er til matr. nr. 301, 303 og 290b**

Undir Gøtueiði er vegur frá landsvegnum og til húsini hjá Regin Joensen, Kristianna Joensen (Hendrik Eskildsen) og Alexander Joensen. Eysturkommuna tosaði við Regin Joensen í juli mánað, um at kommunan yvirtekur vegin, ella rættari sagt, asfalterar vegin og so yvirtekur vegin. Tað er fyrimunur at kommunan hevur ábyrgd av øllum vegum og viðlíkaheldur vegirnar (tað eru nakrar munligar avtalur ið eru gjørdar fyri nógvum áðrum síðan um viðlíkahald, kavarudding o.a. sum eingin veit um í dag av hesum vegnum og øðrum stuttum vegateinum). Ynski er at ábyrgd, rakstur og viðlíkahald av vegum er hjá kommununi.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at vegurin til matr. nr. 301, 303 og 290b verður yvirtikin av Eysturkommunu.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

**9. 13/00342**

**Fyrispurningur um at gera spælipláss á matr. nr. 128h í Leirvík.**

Tað hevur verið nakað av samskifti millum umsitingina og umsøkjararnar við Bólstein um at gera spælipláss á kommunalumm øki sum liggur millum húsini eftir vegnum við Bólstein.

Á BOB fundi tann 15. mai 2013 og á fíggjarnenvdarfundi tann 21. mai 2013 er sama málið umrøtt í sambandi við spælipláss og sparkivallir, og var samtykt, at gera eina heildarætlan fyri hvar og hvussu nógv spælipláss skulu vera í kommununi og raðfesting av verandi spæliplássum.

Byggi- og býarskipanarnevndini mælir frá at gera verandi fríøkið við Bólstein til spælipláss, men í framtíðini hava fokus á og taka hond um tey spælipláss ið kommunan eigur.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mánadagin 26. august 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til at fríðøkið verður lagt út sum sethúsaøki B í framtíðini. Broytingin í byggisamtyktini verður framd saman við øðrum broytingum í skulu geraðast í framtíðini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**10. 13/00274**

**Umsókn um stuðul til forskúlan og frítíðarstovuna í Kelduni**

Samtykt var á fundi í Mentanarnevndini 10. juni 2013 at arbeiða víðari við málinum

Mentanarnevndin mælir til ikki stuðla, grundað á at okkara skúlaskipan hevur góð og dekkandi tilboð.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**11. 13/00333**

**Tilboð uppá kort/kunningarfaldara**

Vinnunevndin mælir til at gera ein kunnningarfaldarar fyri Eysturkommunu. Mælt verður til at veita eykajáttan á 150.000,00 til endamálið.

Mentanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá Vinnunevndini og at arbeiðsgongd verður lýst nærri. Umboð fyri Mentanarnevnd, Vinnunevnd og umsiting skulu verða við í arbeiðinum at mynda faldaran.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og mentanarnevndini.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 26. august 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**12. 13/00332**

**Fyrispurningur um keyp av egningaskúrunum í Leirvík**

Vinnunevndin mælir frá at keypa egningarskúranar.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**13. 13/00322**

**Útbjóðing av flísaarbeiði á gongubreytir í Syðrugøtu**

Støðutakan til innkomin mál

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini, at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Oscar Poulsen á kr. 312.960,00 uttan mvg.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Brandur Jacobsen
Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen,

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Ólavur Olsen ______________________

**Býráðsfundur mánadagin 26. august 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Árni Jacobsen ____________________________________________

Oluffa Joensen ____________________________________________

Brandur Jacobsen ____________________________________________